


Fólkafundur:

## 200 ár síðani Nólsoyar Páll og Royndina Fríðu

**200 ár eru liðin síðani Nólsoyar Páll bygdi Royndina Fríðu og verður tískil skipað fyri fólkafundi á jóansøku, har Torbjørn Jacobsen heldur røðu**

FÓLKAFUNDUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Sunnudagin klokkan 14 er fólkafundur á Fløtuni Fríðu. Tað var har Nólsoyar Páll og aðrir bygdu Royndina Fríðu, ein varði í føroyskari siglingarsøgu.

Tað eru í ár 200 ár síðani hesa stórhending, sum fór fram á Fløtuni Fríðu í Vági. Fyri at minnast hetta, verður fólkafundur hildin og røðari á fundinum verður Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður.

Aftaná er café umborð á Johonnu.

# Pakkhúsið góður karmur

**Stóra Pakkhús í Vági verður karmur um mong tiltøk á jóansøku**

MENTAN
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



*Stóra Pakkhús*
*Mynd: D.Olsen*

Stóra Pakkhús í Vági er snotiligur karmur um alskyns tiltøk, eftir at húsið var sett í stand fyri nøkrum árum síðani. Har eru bæði konsertir, fundir, framsýningar og hugnaløtur og jóansøkan er einki undantak í so máta.

Sera forvitnislig er sjálvandi tónleikacaféin, ið á jóansøku seinast eydnaðist sera væl í hugnaligu hølunum. Í ár luttaka millum onnur Tróndur Enni og Guðrum Sólja Jacobsen.

Sjósavn er eisini í húsinum og ber eisini til at vitja innar at kunna seg um hesi viðurskiftii.

Annars eru húsini søga í sjálvum sær og eru eina vitjan verda, tí tey eru í upprunastandi og t.d. síggjast gomlu el-skipanirnar, sum óivað teljast millum tær elstu í Føroyum og stuttligt er eisini at síggja nøvnini á teimum, ið hava ritað navn sítt á pakkhúsveggin, hvørt tað so var í spølni ella í eini fríløtu.

# Nýggj Royndin Fríða

**Tað er við at vera síðsta útkall hjá róðrarbátinum Royndini Fríðu, tí fyrsta dagin fáa vágbingar nýggjan bát, ið skal bera navnið Royndin Fríða**

KAPPRÓÐUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Bátar og kappróðarbátar - og kanska eisini størri før - røkka ofta høgan aldur í Vági. Grindabátarnir eru søguligir og sluppin Johanna talar fyri seg.

Fleiri av kappróðrarbátunum í Vági eru eisini gamlir, men eru til enn og Tofta Regin verður 70 ár í summar. Men nýggir bátar leggjast til og í næstum verður aftur nýggjur bátur á fjørðinum.

Tá verður tað ein nýggj Royndin Fríða, ið fer um bylgjuna bláu. Fleiri kappróðrarbátar við navninum Royndin Fríða hava verið í Vági og hendan komandi er nummar 4 ella 5 í røðini. Royndin Fríða, sum nú fer í søguna, er bygd í sjeytiárunum. Sámal Hansen, bátasmiður við drúgvum royndum við kappróðrarbátum, hevur smíðað nýggju Royndina Fríðu til Vágs Kappróðrarfelag.




*Hesar manna Royndina Fríðu og nú fáa tær nýggjan bát at royna seg í*
*Mynd:D.Olsen*






















